**Leiðreglur fyri ljósskipanir á fótbóltsvøllum í Tórshavnar kommunu**

**Innleiðing og endamál**
**§ 1.** Hesar leiðreglur skulu tryggja, at borgarar, fótbóltsfeløg, Ítróttaanlegg og Fótbóltssambandi Føroya (FSF) hava greiðar reglur fyri ljósskipanir á fótbóltsvøllum í Tórshavnar kommunu.
**Stk. 2**. Endamálið er at tryggja, at ljósskipanir verða nýttar so munagott og skynsamt sum gjørligt, bæði í mun til orkunýtslu og fyri at avmarka ljósdálking og -ampa.

**Allýsingar**
**§ 2. Fótbóltsvøllir:** Ovari vøllur í Gundadali, Niðari vøllur í Gundadali, Eysturvøllur, Vøllurin úti í Vika, Hoyvíksvøllur og Tórsvøllur. **Fótbóltsfeløg:** HB, B36, AB, FC Hoyvík, Undrið FF, sum í verandi støðu eru virkin innan kappingarfótbólt hjá FSF og sum hava heimstað í Tórshavnar kommunu.

**Ábyrgd**
**§ 3.** Tað er til einhvørja tíð heimaliðið sum hevur ábyrgd av at fylgja hesa reglugerð. Heimalið eru øll lið lýst í § 2, øll landslið hjá FSF, ella onnur fótbóltsfeløg og landslið, ið lána vøll í TK.
**Stk. 2**. Ítróttaranlegg stýrir ljósini við klokku á øllum vøllunum í TK.
**Stk. 3**. Heimaliðið hevur ábyrgd av at senda nýtslutíðina av venjingum/dystum til Ítróttaranlegg, tá árliga virksemið fer í gongd, og leypandi kunna um broytingar.
**Stk. 4**: Ljósið við vøllirnar í TK skal verða sløkt í seinasta lagið kl. 22.05.

**Tórsvøllur - dystir hjá FIFA/UEFA**
**§ 4.** Tað er bert loyvi at brúka stig 4 í ljósskipanini í samb. við dystir undir fyriskipan hjá FIFA/UEFA.
**Stk. 2**. Loyvið í § 4 er galdandi tveir tímar áðrenn dyst og upp til ein tíma eftir dystin. Hereftir skal ljósið setast niður á stig 1, og í seinasta lagið tveir tímar eftir dystin, skal ljósið sløkkjast aftur.
**Stk. 3**. Til almennu venjingina dagin fyri dyst hjá FIFA/UEFA, kann ljósið setast á tað styrki sum kravt er til dystin. Ljósið kann, í fyrsta lagi, tendrast hálvan tíma innan venjing og skal sløkkjast í seinasta lagið hálvan tíma eftir venjingina. Hetta er galdandi fyri venjingina hjá bæði heimaliðið og útiliðið.
**Stk. 4**. Til aðrar venjingar hjá landsliðum og feløgum er bert loyvi at brúka stig 1. Víst verður eisini til § 7, stk. 3 og stk. 4.
**Stk. 5**. Tá serlig sjónvarpsútgerð er til dystir hjá FIFA/UEFA, har vaktarhald krevst um útgerðina, er loyvi at brúka stig 1, meðan útgerðin er á Tórsvølli. Hetta er eisini galdandi um náttina.
**Stk. 6**. Tá serlig sjónvarpsútgerð skal roynast undan dyst, er loyvi at brúka stig 4, meðan útgerðin verður roynd.

**Tórsvøllur – dystir í føroysku kappingunum**
**§ 5.** Í landskappingardystum í bestu deildini hjá kvinnum og monnum er hægst loyvi at brúka stig 3.
**Stk. 2**. Í landskappingardystum í næstbestu deildini hjá kvinnum og monnum er hægst loyvi at brúka stig 2.
**Stk. 3**. Í dystum í steypakappingin hjá kvinnum og monnum er hægst loyvi at brúka stig 3. Semifinalur og finalan í steypakappingini, umframt stórsteypadystur, kunnu brúka stig 4.
**Stk. 4**. Í landskappingar- og steypadystum í øðrum deildum enn teimum , ið eru nevndar í í § 5 stk. 1-3, er hægst loyvi at brúka stig 1, tó undantikið steypafinalur í yngru deildum, har loyvt er at brúka stig 3.
**Stk. 5**. Í venjingardystum er loyvt at brúka somu styrki sum í landskappingardystum í viðkomandi deild, ið eru lýst í § 5 stk. 1-4, tó ongantíð hægri enn styrki 2.

**Stk. 6**. Loyvið er galdandi ein tíma áðrenn dyst og hálvan tíma eftir dystin. Hereftir skal ljósið sløkkjast aftur, um ongin venjing ella dystur er aftaná.

**Ovari vøllur – dystir hjá FIFA/UEFA**
**§ 6**. Hægsta ljósstyrkin (standard) kann brúkast í samb. við dystir hjá FIFA/UEFA.
**Stk. 2**. Loyvið í § 6 er galdandi tveir tímar áðrenn dyst og upp til ein tíma eftir dystin.
**Stk. 3**. Almenna venjingin dagin fyri dyst hjá FIFA/UEFA, kann ljósið setast á tað styrki sum kravt er til dystin. Ljósið verður tendrað í fyrsta lagi hálvan tíma innan venjing og skal sløkkjast í seinasta lagið hálvan tíma eftir venjingina. Hetta er galdandi fyri venjingina hjá bæði heimaliðið og útiliðið.

**Ovari- og niðari vøllur, Hoyvíksvøllur og vøllurin í Vika – venjing, dystir hjá FSF, heimligu kappingarnar**
**§ 7** Hægsta ljósstyrkin kann brúkast í samb. dystir ella venjingar.
**Stk. 2**. Við leikvøllirnir er knøttar, ið brúkarar sjálvir kunnu brúka til at tendra ljósini. Tá sløkna tey sjálvvirkandi kl. 22.
**Stk. 3.** Í teimum førum, har tað tekniskt letur seg gera, sløknar ljósskipanin automatiskt eftir kl. 20.00, um onki virksemi er á vøllinum.
**Stk. 4.** Teir ljósu summarmánaðirnir, kunnu ljósini bara verða tendrað í serligum førum.

**Eysturvøllur**
§ 8. Hevur standardskipan, ið brúkarar sjálvir kunnu tendra. Skipanin sløknar sjálvvirkandi kl. 22.

**Undantøk**
**§ 9** Í serligum førum verður undantak givin í hesi reglugerð. Hetta kann t.d. verða í samband við teknisk krøv við upptøku, serligar dystir- og kappingar.
**Stk. 2**. Í seinasta lagið 3 dagar áðrenn dystin/venjingina skal skriftlig umsókn um undantak sendast til Ítróttaranlegg, ið ger av um umsóknin um verður gingin á møti.

**Gildiskoma**
**§ 10** Hesar leiðreglur koma í gildi 1. mai 2021.